Umhvørvismálaráðið

Dagfesting: 07.04.2025
Mál nr.: 25/08961
Málsviðgjørt: ARØ

Fylgiskjal 1

Javntekstur

Galdandi orðingar í løgtingslógini samanbornar við broyttu orðingarnar í løgtingslógaruppskotinum.

Galdandi orðingar	**Løgtingslógaruppskotið**
§ 20 a. Fyri fiskimenn, sum eru við fiskiskipum, sum hava veiðiloyvi sambært løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap, og sum verða løgd vegna umvælingar, verður arbeiðsloysisstuðul goldin eftir 30 dagar, frá tí at skipið varð lagt, hóast setanarliga tilknýtið millum fiskimannin og reiðaríið ikki er av. Goldið verður í mesta lagi fyri 60 útgjaldsdagar. Fyri hvørjar kr. 1.000,-, sum útrokningargrundarlagið hjá fiskimanninum fer upp um upphæddina, nevnda í § 16, stk. 2, minkar útgjaldið við 0,5 prosentstigum. *Stk. 2.*	**§ 1** Í løgtingslóg nr. 113 frá 13. juni 1997 um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing (ALS-lógin), sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 42 frá 25. mars 2025, verður í § 20 a, stk. 1, "løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap" broytt til: "løgtingslóg um sjófeingi", "30 dagar" broytt til: "15 dagar", og "60 útgjaldsdagar" broytt til: "90 útgjaldsdagar".